VIÐMERKINGAR

# Feigdargullið



**Tórbjørn Jacobsen**
*natoja@ft.dk*

Komið er nú fram at teimum mørkum, harið landsins fíggjarlóg fyri komandi ár verður drigin oman eftir lunni. Politiska kremið, við fylgisneytum, hevur í eitt heilt vikuskifti verið á budgetlegu norðuri á Viðareiði. Ivaleyst eitt skilagott átak tá ið so nógvir nýggir stjórnaroddvitar eru, ið skula samansjóvast og lærast hegnið, at flyta fíggjarorku yvir um ósjónlig stik, fyri samfelagsins frama, og at fíla burturav, har tað er neyðugt, skal stabiliteturin í samfelagnum vera sum frægastur frameftir.

Vøksturin í landsrakstrinum hesi seinastu fýra árini man nú samanlagt kjálka upp ímóti milliardini, og tað sum higartil er komið út ímillum ryvjabeininini á monnum, er at fíggjarlógin fyri komandi ár helst fer at kvinka nakað væl uppeftir eisini. Í fyrsta yvirslagnum fréttist frá fleiri hundra milliónum krónum í meirrakstri í mun til verandi ár. Okkurt er tó, sum bendir á, at nakað av køldum vatni er sligið í blóðið á teimum ráðandi, og at tey eru ávegis at nærkast jørðini aftur.

Verandi fíggjarlóg er snikkað til í einum valári, harvið er hon ikki rætta undirlendið, tá ið fíggjarlógin fyri komandi ár skal smíðast og fáast at standa uppi.

Tað er eftirhondini vorðin ein óskrivað sátt, ímillum sjálvstýrisfólk og sjálvstýris-politikarar, í hvussu so er, at fíggjarligt sjálvbjargni og politiskt frælsi eru at meta sum siamesiskir tvíburðar. Óskiljandi bæði so og so. Lítið høpi man vera í hesi fatan. Filosofiskt eru hugtøkini sum eldur og vatn. Hetta er tað sama sum at siga, at alifiskurin á Lambavík skal venja seg til frælsi í aliringunum, at hønurnar hjá Brekkstein skula venja seg til frælsi í høsnarhúsinum á Velbastað og at tær smáu hvítu mýsnar í lokaðu karusellunum í djóragørðunum skula venja og styrkja seg til frælsi undir vardum umstøðum. Hetta er heimastýri, sum tú ongantíð sleppur burturúr, tí at tú sært ikki út um girðingarnar. Frælsi er ókent og harvið so trupult at fata. Bara tey søguligu gapini hjá Voltaire eru løðarsteinar, sum kunna brúkast í royndini at trýsta seg út ígjøgnum girðingarnar.

Kreppan var eitt slíkt gap. Hvat ónt ið hon annars var, so opnaði hon eyguni hjá teimum flestu. Lættari var at skoða út ígjøgnum meskarnar tá ið nótin var skræðnað. Politiskt frælsi kom aftur á dagskrá. Í ringastu búskaparligu heljargongd hetta landið hevur upplivað. Tað mest ítøkiliga úrslitið hjá fyrru samgonguni mundi vera niðurlagingin av blokkinum við sløkum 400 milliónum krónum. Í grundini eitt bragd. Serliga í mun til ta søguligu gongdina líka frá stríðsárunum, har ið búskaparliga heftni bara stóð við og vaks, nærum ótálmað fram ígjøgnum árini.

Og nú er tað at ryggur krevst av tí politiska establishmentinum. At ganga strekkmarsj á ólavsvøku, vitja almennar móttøkur og drekka djús og alkoholiseraðan berjaløg úr Maipo-dalinum afturvið hurrarópunum fyri allari landsins herligheit og at spenna bringuna fram úr sær við einum MP-visitkorti frá føroyska koloniparlamentinum, verður ikki nógmikið. Tað skal annar og sterkari lútur til, skal endaligt skil fáast á búskaparligu og stjórnmálsligu støðu Føroya.

Vit hava sum er eina av heimsins rúgvismestu fíggjarlógum pr. íbúgva, búskapurin er farin at gløða, tað vænta einar 5-600 milliónir í, áðrenn landshúsarhaldið stendir uppi av egnum mátti og skuldin hjá tí almenna er framvegis alt ov stór.

Ein fyritøka sum ikki hevur sær tað fyri eyga, at rationaliseringsátøk helst skula fremjast hvønn dag, ber ikki boðini. Sami frymil man vera galdandi fyri almennar stovnar, skal ikki metasenturhæddin falla somikið, at kjølfestan sleppur yvirbygningi-num og alt holvist í einum, - einaferð enn. Kynið í øllum er vøkstur, eisini í almenna sektorinum, tí er tað alneyðugt áhaldandi at vera á varðhaldi, og lúka tað burturúr, sum onga nyttuna ger. Longu fyri fýra árum síðani var róð framundir, at farast skuldi inn á almennu røkurnar at lúka, men tað hendi einki. Absolut einki. Tað seinasta er so at 9 kolonibestýrarar eru settir eftir Norman-doktrinini, at røkja donsku ognirnar í norðurhøvum, hvør við sínum megahala av stjórum, fulltrúum, juristum, skrivstovukallum, pedellum, konsolentum o.s.fr. Ørkimlandi fyri fleiri kanska, tá ið hetta er sama politiska skipanin, sum áður var røkt av trimum ella fýra, oftani ólærdum monnum, í eina hálva øld.

Ímeðan eru fyrstu indikatorarnir komnir, ið boða frá, at vøksturin í inntøkum landsins fara at stagnera. Vøksturin í exportvirðinum hevur mist ferðina. La belle epoqe, tíðin við rúkandi vøkstri, støðugum búskaparligum sólskini, er linkandi, tí ræður um at hava fyrilit, so tað stendur eftir.

Fyri ein leikmann er tað einki tekin í sól og mána, sum sigur honum, at karmurin á fíggjarlógini fyri komandi ár skal víðkast ella hækka, - yvirhøvur. Kanska tvørturímóti. Serliga um málið, einar sjálvberandi Føroyar, framvegis er tað sum stremba verður framímóti. Og sjálvt um tjóðskaparpolitiska grundstøðið hjá sitandi samgongu er sum kranavatn afturímóti tí hjá undanfarnu koalitión, so má man loyva sær at vænta, at skil og fyrilit vera hornasteinarnir, tá ið fólksins fíggjarorka skal umsitast, - eisini uppá sikt.

Sagt verður, at breiðar herðar skula til í góðum tíðum, at stjórna einum samfelag. Nakað man vera um tað. Men hinvegin krevst so sanniliga sterkur ryggur, skal tú koma tær snikkaleysur ígjøgnum minni góðar tíðir. Nú velst alt um politiska kremið í Nesinum og so sjálvandi atkvøðuneytini uppi á Vaglinum. Tað eigur og skal bera til, yvir hetta 4 ára valskeiðið, at skerja allan blokkstuðulin burtur úr føroyska landsrakstrinum, soleiðis at vit tá kunna fáa staðfest, um nú nakað hald var í hesum vitleysa flosklinum, um at búskaparligt sjálvbjargni og politiskt frælsi, neyðturviliga skula vera ein alin av sama vaðmali. Loyvi mær at ivast. Hugsi at hetta heldur er eitt uppfunnið alibi hjá politiskum trygdarnarkomanum, fyri framhaldandi at sleppa at dusa sær í politiskum alringum, høsnarhúsum og karusellum, sum fremmandir menn hava sett seg á, stjórna og eiga.

Tjóðveldisflokkurin situr við lyklinum úti í fíggjarmálastýrinum. Nógv stendur og fellur við hansara leikluti. Um tað ber ella brestur, nú gleivið í gapinum hjá Voltaire ikki er so vítt sum tað var fyri fýra árum síðani. Vísa vit rætta dirvið og hegnið og kanska ofra bara eitt evarska lítið petti av yvirflóðini, sum nú herjar hetta landið, so hugsi eg at tað fer at bragda, - annars ikki. Annars mega vit bíða eftir næsta gapinum. Hvør ið tá stendur uppi, - ella liggur undir moldum.

Allur útreiðsluvøkstur nú, er sum ístur, feigdargull, ið Grani neyvan stendur undir, tá ið hann ríður heim av heiði. Vit eru komnir framat eini lagnustund, har ið føroyskir sjálvstýrispolitikarar skula vísa mansevni, skula prógva um skapta tesan, samanflættingin av hugtøkunum búskaparligt sjálvbjargni og politiskt frælsi, hevði nakað uppá seg, ella bara var blektað bluff fyri at tekkjast einum parti av fólkinum og fyri at røkja klistrið á politisku taburettunum. Nú spyrst sum livst.

# Brúkararnevndir ársfund í Føroyum

**Í komandi mánað koma norðurlendsku brúkararnevndirnar til Føroya at halda ársfudn og ráðstevnu**

RÁÐSTEVNA
*Heri á Rógvi*



*Tað er Hans Pauli Strøm, fyrrverandi tingmaður, sum er føroysku kontaktpersónur í sambandi við ráðstevnuni og ársfundin hjá Norðurlendsku Brúkararnevndini í Føroyum 12. og 13. september.*

Norðurlendska Brúkaranevndin fer í døgunum 12. og 13. september at halda ársfund og ráðstevnu í Føroyum.

Norðurlendska Brúkaranevndin er samstarvsnevndin hjá brúkararáðunum í Norðanlondum. Her luttaka umboð fyri Brúkararáðini í Íslandi, Grønlandi, Danmark, Noregi, Svøríki og Finlandi. Av góðum grundum eru Føroyar ikki við í hesum samstarvi, tí enn hava vit onki brúkararáð og onga skipan fyri brúkararnar her. Men tað kann kanska broytast, og m.a. tí hevur Norðurlendska Brúkaranevndin (NBN) avgjørt at halda sín ársfund júst í Føroyum.

Umframt at NBN heldur sín regluliga ársfund fund her, vil hon eisini nýta høvi at greiða føroyingum frá, hvussu arbeitt verður fyri brúkaraáhugamálum í Norðanlondum og frá aktuellum brúkarapolitiskum høvuðsmálum.

16 fólk koma til landið í sambandi við ársfundin og ráðstevnuna.

Enska heitið á seminarinum er »Digi-tv - television as a consumer platform«. Hetta snýr seg m.a. um, at við digitalu ella teldutøkniligu menningini av sjónvarpinum, hendir ein grundleggjandi og álvarslig broyting í samskiftinum millum hyggjararnar (ella brúkararnar) og sjónvarpsstøðirnar. Umframt vøksturin í útboði av ymsum rásum, koma sonevndar interaktivar tænastur (har hyggjarar kunnu samskifta beinleiðis við ein útbjóðara), spøl og ítriv, og elektroniskur handil sum beinleiðis søla og keyp av vørum og tænastum.

### Á berum

Tað er Hans Pauli Strøm, fyrrverandi tingmaður, sum er føroyski kontaktpersónurin í sambandi við ráðstevnuni. Í sínum politiska yrki arbeiddi hann nógv við brúkaraviðurskiftinum. Hann heldur, at vit kunnu læra nógv av hinum norðanlondunum.

– Í Føroyum standa vit so at siga á berum hesum viðvíkjandi. Tí kann tað verða hugvekjandi at hoyra, hvussu brúkarapolitikkur, brúkaraverja og brúkaraupplýsing er skipað í Norðanlondum. M.a. hvørji tiltøk eru neyðug frá almennari síðu viðvíkjandi lóggávu og stovnum. Og týdningurin av at brúkararnir eisini sjálvir eru skipaðir í felagsskap at tala teirra søk, sigur Hans Pauli Strøm.

Áhugaði fyri ráðstevnuni kunnu seta seg í samband við Hans Paula.






**Linjuføring**
Fólkafloksmaður í útvarpsorðaskiftinum stutt herfyri tosaði um at fáa heingjubrúgv yvir um Vestmannasund til Vágar. Men har er longu ein bíligari heingibrúgv. Har ganga tríggjar linjur yvirum. Hví ikki útnytta háspenningslinjunar til rennistrong sum t.d. sporvognar nýta? Tað er longu roynt millum fjøllini í Sveits og aðrarstaðir. Vit síggja á myndini, hvussu væl tað letur seg gera!

*Hesa viðmerkingina hevði Johs. Haraldsen, sáli, á baksíðuni í Dimmalætting um uppskotið um heingibrúgv um Vestmannasund*

# Nógv ørari at tosa um tunnil

**Tað hevði verið nógv ørari at tosa um at bora tunnil undir Vestmannasund, sigur Vilhelm Nielsen, sum í 1978 var við til at leggja uppskot fram um heingbrúgv um Vestmannasund**

FASTA SAMBANDIÐ
*Eirikur Lindenskov*



*Vilhelm Nielsen sigur, at um teir høvdu tosað um at bora tunnil tá – í seksti ella sjeytiárunum – í staðin fyri at tosa um heingibrúgv, so høvdu fólk hildið teir verið púra ørar…*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað var tann 4. september í 1978, at Halldor Hansen og Vilhelm Nielsen, tingmenn fyri ávikavist Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin í Vága valdømi, løgdu fram á ting uppskot um »Heingibrúgv um Vestmannasund, samanbundin við bergholi og vegi til Vatnsoyrar«.

Talan var ikki um eitt lógaruppskot, men eitt uppskot til samtyktar.

Teir skutu upp, at løgtingið skuldi áleggja landsstýrinum at kanna og projektera hetta arbeiðið.

### 1.350 metrar long brúgv

Teir høvdu eisini latið gjørt kanningar á staðnum, sum m. a. søgdu, at festini skuldu liggja í umleið 120 metra hædd, nakað tað sama sum el-spennið hjá SEV.

Brúgvin skuldi verða 1.350 metrar til longdar og 1.100 metrar av vegi skuldi gerast hvørju megin við. Brattleikin á vegunum er teknaður til 125‰, sum er 35‰ brattari enn tað brattasta av Oyrargjógv og niðan á Háls.

Vegirnir, sum gerast skulu í sambandi við brúnna skuldu verða um 5.150 metrar til longdar, og bergholið til Vatnsoyrar skuldi verða 1.350 metrar – eins langt og brúgvin. Hetta skuldi stytta vegin av Vatnsoyrum til brúnna við sjey kilometrum.

### Tingið samtykkir

Tingið beindi málið í vega- og havnanevndina, sum 8. september 1978 leggur fram álit.

Nevndin var samd um at taka undir við uppskotinum, tó við teirri broyting, at løgtingið áleggur landsstýrinum at »kanna« málið um heingibrúgv um Vestmannasund við vegi og bergholi til Vatnsoyrar.

Nógv varð sjálvandi tosað um hetta uppskotið um heingibrúnna, sum fólk ikki tóku heilt í álvara – tey hildu tað vera luftkastellir.

Um hetta mundið sótu Javnaðarflokkurin, Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin í samgongu. Løgmaður var Atli P. Dam, og hann umsat eisini samferðslumál. Málið um heingibrúnna var ikki eitt samgongumál, tó at bæði Haldor Hansen og Vilhelm Nielsen vóru samgongutinglimir.

Sambært løgtingstíðindum, so fekk málið 16 atkvøður fyri og onga ímóti – men hvør, ið greiddi atkvøðu, meldar søgan einki um.

Tveir mánaðir seinni varð løgtingsval, so tá er málið helst fallið burtur.

Samgongan millum teir tríggjar flokkarnar helt kortini fram til val varð útskrivað í 1980.

Ikki fyrr enn seinni í áttatiárunum var aftur farið at tosa um fasta sambandið um Vestmannasund, men tá sum undirsjóvartunnil, tí hendan tøknin varð nógv ment, serliga í Noreg.

### Nógv ørari at tosa um tunnil

Vilhelm Nielsen segði við Sosialin í gjár, at hetta málið hevði sera stóran týdning í hansara verð, og tí lá tað altíð frammaliga hjá honum.

– Eg havi altíð viljað, at vinnulívið í Vágoynni skuldi hava somu treytir, sum tað hevur á »Meginlandinum«, og eg ivist ikki í, at undirsjóvartunnilin fer at hava sera stóran týdning fyri framburðin í Vágum, sigur hann.

– Tá var ikki hugsingur um at tosa um at bora ein tunnil undir sundinum. Høvdu vit gjørt tað, so høvdu fólk hildið okkum verið nógv ørari, sigur Vilhelm Nielsen við einum smíli.

Umframt at vera løgtingsmaður í mong ár, so hevur Vilhelm Nielsen eisini verið vinnulívsmaður, hevur í mong ár havt Skinnvirkið Vilma, sum hann sjálvur hevur staðið fyri til fyri fimm árum síðani.

Vilhelm er útbúgvin skósmiður. Hann sigldi í yngru árum og hevði seinni hevði ábyrgd av fiskaturking hjá bróðrinum Zacharis Nielsen, og seinni fór hann at handla, og var hann eitt nú tann fyrsti at selja el-lutir so sum útvarpstól, ljósakrúnur o. a. í Vágunum.

Vilhelm Nielsen er giftur við Marionnu, ættað av Válinum. Tey høvdu diamantbrúdleyp í apríl. Tey eiga børnini Paula, Sofus, Sólgerð og Onnu.

## Føroyar tódna

VÁGATUNNILIN
*Eirikur Lindenskov*

Í blaðnum í gjár greiddu vit frá ferð við fyrrverandi tingmanninum,Vilhelm Nielsen í Sandavági, gjøgnum Vágatunnilin, eini ferð, sum hann fekk í føðingardagsgávu frá Dáva Reinert Hansen, stjóri fyri Vágatunlinum.

Vit báðir, myndamaður og blaðmaður, vóru við á ferðini, og vit kunnu eftir hendan túrin sanna, at »Føroya tódna«.

Vit møttu sum vant til arbeiðis í blaðhúsinum á Argjum kl 8, vóru á redaktiónsfundi og fyrireikaðu dagsins blað, áðrenn vit settust í bilin kl 8:45 við kós móti Leynum.

Síðani koyrdu vit, í fylgi við Dávidi Reinert Hansen gjøgnu tunnilin til Sandavágs.

Heima hjá Vilhelmi Nielsen fingu vit kaffi og køkur og eitt prát, áðrenn vit hildu leiðina aftur til tunnilsmunnan sunna fyri Fútaklett á Vágoynni. Har varð steðgað, myndir tiknir, og so aftur í bilin. Vit steðgaðu á botni í tunlinum, sum er 105 metrar undir vantskorpuni, tóku aftur myndir, áðrenn leiðin helt fram niðan aftur til tunnilsmunnan Leynamegin. Har steðgaðu vit aftur, tóku myndir, og hildu so fram víðari til Havnar og út á Argjar.

Á Argjum vóru vit kl 11:00. Altso, túrurin vestur til Sandavágs tók okkum alt í alt tveir tímar og eitt korter!